umborð



*Á koppinum, hann situr við, meðan vit práta í hugnaliga heiminum í Hirtshals, stendur, at "det er ikke let at være SLANK, når du er rig.." - Henda koppin havi eg fingið frá einum av mínum abbabørnum, sigur fryntligi nólsoyingurin, Jens Sigmund Jacobsen Mynd: Vilmund Jacobsen*

## 14 ár við Grími

Í 1959 kemur Grímur Kamban hjá Poul Hansen, og tey fyrstu árini førdi Volsgang Andreassen skipið.

- Eg var við Grími í tilsamans 14 ár. Tíðliga í sekstiárunum, tá eg hevði fingið mína navigatiónsútbúgving, gjørdist eg 2. stýrimaður við Jens Ferdinand Poulsen sum 1. stýrimanni. Tá var Volfgang framvegis á brúnni sum skipari. Seinni gjørdist Brynjálvur Petersen úr Sandavági skipari, og tá Jens fór við Brandi Sigmundarsson, gjørdist eg 1. stýrimaður.

Mundi sigur seg minnast tann eina túrin í Ný Foundlandi, tá teir vóru burtur í einar fimm mánaðir.

- Fiskiskapurin var smáligur í Ný Foundlandi, og heimaftur komnir gjørdu vit ein brosmutúr undir Føroyum, har vit saltaðu og flaktu umborð.

Í 1965 leggur Grímur Kamban um til kraftblokk og fer at fiska við nót, og tá er Brynjálvur Petersen framvegis skipari.

- Sum tíðin leið, fór eg at loysa Brynjálv av sum skipara, og eg haldi, at eg fyrstu ferð var á brúnni sum skipari á Grími Kamban í 1966. Tá Brynjálvur seinni fór umborð á Gullfinn at hjálpa teimum í gongd við nótaveiði, gjørdist eg skipari á Grími.

- Tíðliga í sjeytiárunum varð skipið selt til Hirtshals, og eg førdi Grím í umleið eitt ár, meðan skipið var heimahoyrandi í Hirtshals.

## Til Svøríkis á nótaveiði

Mundi varð nú biðin við einum nýggjum svenskum nótabáti, sum kallaðist Sette Mari, og her loysti hann eisini av sum skipari. Men tíðin umborð á Sette Mari gjørdist stutt.

- Nú bleiv eg biðin við einum øðrum svenskum nótabáti sum kallaðist Stella Nova, og her var eg í einar níggju mánaðir.

Eftir hetta kom Mundi heimaftur til Føroya at sigla.

- Nú varð eg biðin við Skálafossi, sum skálamenn áttu, og her loysti eg skiparan, Ernst Mikkelsen, av í nakrar mánaðir.

Enn búði familjan heima í Føroyum, men meðan Mundi var við Skálafossi, ringdi Skagerak Fiskeeksport og søgdu, at teimum vantaði skipara til nótabátin, Strømegg.

- Eg fór at føra Strømegg hin 16. oktober í 1976, og eg var við skipinum í sløk 10 ár.

Tað var um hetta mundi, at nólsoyingurin flutti niður til Hirtshals at búgva, og um summarið 1977 flutti so øll familjan til Danmarkar.

- Í fyrstani segði kona mín, at hon vildi royna at búgva í Danmark í tvey ár, men tá tvey ár vóru umliðin, helt hon, at hon vildi royna í fimm ár, sigur Mundi, meðan konan, Sigvør, situr hinumegin borðið í hugnaliga køki teirra.

## Keyptu Herdis J

Í 1986 tóku Jens Sigmund Jacobsen og aðrir stig til at keypa sítt egna skip, sum fekk navn eftir mammu hansara, Herdis.

- Í byrjanini vóru vit fleiri, sum vóru saman um skipið, og allir vóru føroyingar. Vit keyptu skipið lutfalsliga dýrt, og mangan stóð á gomlum nøglum. Men tey seinnu árini gekk heilt væl.

Sum tíðin leið, vóru teir bar fýra, sum áttu í skipinum, Sólfinn, sonur Munda, bróðirin Grækaris og skopuningurin, Arngrím Zachariassen.

Partarnir hjá hesum fýra vóru ávikavist 44%, 22%, 22% og 12%.

- Í 2004 fingu vit eitt sera gott boð upp á skipið. Vit kundu fingið uppaftur meira, um vit seldu skipið úr býnum, men vit valdu heldur at selja fyri nakrar miljónir krónur minni og varðveita kvoturnar í økinum.

Mundi vil ikki siga ítøkiliga, hvussu stór søluupphæddin var, men vit skilja, at teir fingu einar 95 miljónir krónur fyri Herdis J.

- Eg tosaði við hinar eigararnar, og vit vóru samdir um, at antin máttu vit selja, nú boðið var so gott – ella máttu vit gera nýggjar íløgur. Vit seldu skipið við teirri treyt, at hinir eigararnir – undantikið eg sjálvur – kundu sigla hjá teimum báðum feløgunum, sum keyptu skipið, í tvey ár.

## Njóta sítt otium

Tað er eingin loyna, at Jens Sigmund og hinir tríggir, sum áttu í Herdis J, fingu nógvan pening burtur úr søluni.

- Nú eg eri 68 ára gamalur, sigli eg ikki meira, men nú kunnu eg og konan hugna okkum saman við familju, vinur og kenningum. Vit hava keypt okkum íbúð í Costa del Sol í Spaniu, og har eru vit, tá høvið býðst. Vit hava eisini keypt okkum ein stuttleikabát, og her heima í Hirtshals hava vit altíð okkurt at takast við. So, vit keða okkum avgjørt ikki, sigur Jens Sigmund Jacobsen, sum eisini hevur gjørt íløgur í aðrar fastognir eftir søluna av Herdis J.